# Kjak



Zakarias Wang

## Ivasom fólka-atkvøða

Í Sosialinum mikudagin tann 11. mai í ár verður sagt í oddagrein, at fólkaatkvøðan í 1946 var demokratiskt sera ivasom.

At fuska við fólkaatkvøðum er sera álvarsligt. Hetta er nakað sum ódemokratiskir valdsharrar plaga at fáast við, og tá spyrst ofta ringt burturúr.

Kunnleikin til fólkaatkvøðuna í 1946 hevur hvørki verið stórur hjá mær ella øðrum, og tí royndi eg at fáa fatur í øllum atkomuligum tilfari um hesa fólkaatkvøðu og legði tað fram í fólkaatkvøðubókini, sum kom út í fjør.

Tey, sum valdið høvdu í Føroyum í 1946 og skipaðu fyri fólkaatkvøðuni, vóru meirilutaflokkarnir í løgtinginum, Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin, eins og danski amtmaðurin í Føroyum og hansara fyrisiting. Sær til hjálpar høvdu tey valstýri og valnevndir, sum vóru valdar av flokkunum á tingi við lutfalsvali, soleiðis at meirilutin á tingi hevði ræði á hvussu valið fór fram.

Tá Sosialurin nú sigur, at fólkaatkvøðan var demokratiskt ivasom, er tí talan um eina grova ákæru móti Sambandsflokkinum, Javnaðarflokkinum og amtmanninum.

Hvat byggir blaðið hesa ákæru á?



Bjarni Djurholm
*løgtingsmaður*
*www.djurholm.fo*

## Arabiskir tilstandir í Løgtinginum?

*Grát mítt elskaða land*

Politiska skilið er nú út av lagi. Landið liggur við kei uttan leiðslu. Tingviðgerðin er í vaksandi mun stýrd av ráksnúni og taktiskum leikum, har mál verða avgreidd, uttan at nakar kennir serligan ognarlut í teimum.

Parlamentariska grundarlagið undir landsstýrinum er nú reyða avgjaldsgongan í tinginum, Tjóðveldi og Framsókn. Mest at líkna við eina parodi, tá hugsað verður um eyðmerkingina av landsstýrinum frá Tjóðveldinum farnu árini og ikki minst um grundgevingarnar hjá formanninum í nýggja flokkinum at stovna "liberala" flokkin.

Og meðan landið spakuliga hoknar undir fíggjarligu avbjóðingunum við fleiri hundrað milliónum í árligum undirskoti, hevur tingið nú samtykt nýggjar útreiðslur fyri 10-tals mio kr. At pynta um úrslitið hevur reyða gongan so sjussað seg til nýggj ad hoc gjøld á vinnuna at rinda raksturin og fyri at fjala ómegdina, ið nú ríður skipanini.

**Loysing**

Í sama andarhaldi var stórmál til viðgerðar, loysingin! Hetta var tó steðgað fríggjadagin av teprum meirluta. Men av røttum kann verða spurt, er einki samband millum teori og praksis?

Við fíggjarlógarundirskoti uppá 450 mio kr, donskum veitingum til blokk og ríkisstovnar omanvert 800 mio, eru vit árliga meira enn 1200 mio kr frá sjálvberandi búskapi. Av røttum kann verða spurt, hvussu óseriøs kunnu fólkavald loyva sær at vera?

At tjóðveldi ikki livir av loysnum, men heldur av retoriskum prosessini og gluggapynti, tað er eingin nýggjheit, men at aðrir flokkar og politikarar yvirhøvur brúka orku upp á slíkt signaluppskot, er at halda sperda vinnulívið og skattliga niðurpíndu borgararnar fyri gjøldur.

Landsbúskapurin kikkar eftir ondini. Tað hevði klætt seg betur um eitt samfelt Løgting brúkti alla orkuna at endurskapa fíggjarligu javnvágina og seta kósina móti búskaparligum sjálvbjargni.

**Partapolitikkur**

Júkað verður eisini upp í saman, at minnilutastøðan ger, at nú verða semjur gjørdar tvørturum floksmørk, at demokrati'ið nú loksins valdar.

Ja, farið eru nú so langt í vælsignilsinum av íkomnu støðuni, at ad hoc uppskot at broyta tingskipanina nú verða játtað av tingformanninum, hóast sami átti at stuðla siðvenjuna, at tingskipanin ikki skal broyast í hissini, men bert sum úrslit av skipaðari tilgongd.

Men »målet helliger midlet«. Stinga mál seg upp sum stuðla partapolitiska hugburðinum, so er líka feitt, hvussu tignin er í viðgerðini.

Og leygarnáttina bar av. Tingskipanin varð broytt soleiðis, at ríkisumboðsmaðurin nú kann væntast at vera dagligur gestur á tingsins røðarapalli at bera boð frá donsku stjórnini.

Men tað er kanska eisini meiningin, ikki minst fyri tey, sum liva best í konfliktum og ósemjum við danir, heldur enn av loysnum!

**Blúgvast ikki**

Men har var kanska ikki annað væntandi, tá hugsað verður um atburðin hjá tingformanninum, sum ikki blúgvaðist - í partapolitiskum herindum - í Norðurlandahúsinum í sambandi við 10-ára hátíðarhaldið hjá Umboðsmanninum, at jarðleggja politiskar samstarvsfelagar, at vera talsmaður fyri eini skueprosess, har politiskt illgresi varð sáað fyri fjøld um persónar, sum higartil ikki hava havt minsta kjans at verja seg (les á heimasíðuni hjá Umboðsmanninum www.lum.fo).

Men hetta ber væl til. Teir órættaðu hava ongan kærumøguleika. Tað tryggjar lógin um Løgtingsins Umboðsmann. Tí kundi tingformaðurin servera sín partapolitikk fyri fjøld av áhoyrarum.

Hetta hevði fingið avleiðingar í øllum skipaðum londum, bara ikki í Føroyum. Ja, sjálvt miðlarnir lótu sum einki, burtursæð frá onkrum journalistiskum hofleverandøri, sum í bløðunum hevur forherligað 10 - ára jubileumshaldið í Norðurlandahúsinum. Men tað var kanska eisini væntandi.

Mest at líkna við arabiskar tilstandir. Grát mítt elskaða land.

Ragnar T. Hentze, útróðrarmaður

## Viðmerking til grein í Sosialinum - nr 43 11. apríl

Hendan greinin viðger fíggjarstøðuna í nýggja trygdargrunninum, og harav fylgjandi herdu krøvini. Hetta raka bók 5 (útróðrarbátar undir 15 tons) sera hart. Hesir bátar sum fyri tað mesta eru bátar í støddini 34 fót og minni, við einum manni umborð, skulu lúka somu treytir, sum skip og bátar í stødd frá umrøddu 34 fót og heilt upp til 110 tons. Kravið er, at avreiðast skal í minsta lagi fyri í meðal 200.000 kr. pr. mann seinastu seks mánaðirnar, og fyri í minsta lagi 25.000 kr í meðal pr mann seinastu tríggjar mánaðirnar. Hesi tølini vóru ávikavist 70.000 og 10.000 í tí gomlu lógini, og tí møgulig at fylgja, eisini fyri bók 5.

Sagt verður í greinin, at hetta verður gjørt, tí fíggjarstøðan í grunninum er so ring, og tí er tað skiljandi, at treytirnar eru herdar. Men men - máti skal vera við tá ræður um tey smæstu førini, altso bólk 5. Tey hava ongan verðsins møguleika at liva upp til hesi krøvini. Eingin ella ógvuliga fáir klára 200.000 kr í seks mánaðir av tí at teir eru serliga sárbærir yvir fyri veðrinum, og tað er akkurát teir veðurringastu mánaðirnar í árinum, ið mest er brúk fyri minstaforvinningi, so henda stóra upphædd blokerar fyri, at hesir bátar kunnu vera við í grunninum og har fáa útgoldið nakað haðani, tá tað verður neyðugt.

Tó er viðtikið við lóg, at teir skulu gjalda inn í grunnin á jøvnum føti við hinar, bæði skip og bátar, sum eru størri og tí nógv betur fyri at lúka ásettu treytirnar.

Verða hesi sera óhóskandi krøv ikki slakað, so tey passa til tær veruligu umstøðurnar, so mugu vit sum eiga bátar í bólki 5 ásanna, at ikki hava øll í Grunninum somu møguelikar fyri útgjaldi. Vit gjalda barnsburðarfarloyvi og fáa einki haðani, (tey flestu sum manna hesar bátar eru farin yvir tann aldurin) vit gjalda til ALS, og hava ongar møguleikar at fáa nakað haðani, og nú so eisini til Trygdargrunn Fiskivinnunnar, og so als onga møguleika, sum er, at fáa nakað haðani.

Ikki kunnu vit royna at forvinna nøkur oyru við síðuna av útróðrinum, tá ringastu umstøðurnar eru, tí so raka vit loftið fyri, hvat loyvt er at forivnna við síðuna av útróðirinum, og so missa vit fiskiloyvið. So ikki kann sigast, at umstøðuranar hjá dagsina útróðararmanni í Føroyum eru lagaligar.

Vón mín á tí vera, at nevndin fyri trygdargrunnin endurskoðar krøvini og lagar tey soleiðis, at allir limir í Grunninum hava ein reellan møguleika at fáa útgjald úr Trygdargrunninum, tá tað er neyðugt. Hetta er væl eisini teirra skylda, av tí at her liggja ikki minni enn 50 milliónir krónur, sum Grunnurin hevur fingið frá tí alemnna at umsita, so allir hava sama møguelikatil útgjald.

N. B. Hoyrdi formannin í nevndini fyri Trygdargrunnin úttala seg í útvaprinum um sama evni, tað gekk klárt frá hansara útsøgn, at hann ikki hevur skilt, at trupulleikin hjá okkum er ikki, at krøvini eru herd, og at allir, eisini vit, eru klárir yvir, at úgjaldið má lække. Okkara trupulleiki er, at tað eru sett krøv í nýggju lógina, sum eru ómøgulig hjá okkum at fylgja. Tí koma vit í framtíðini ongan minstaforvinning at fáa úr Grunninum, um serliga kravið um 200.000 kr pr mann seinastu seks mánaðirnar áðrenn útgjld, ikki verður borytt, so tað hóskar til veruleikan, sum møguligt er at fiska fyri, við slíkum førum sum bólkur 5 er samansettur av.